Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Steffan Klein Poulsen, løgtingsmaður

Svarari: Dennis Holm, landsstýrismaður í fiskivinnu- og samferðslumálum

Evni: Asfalteringin í tunlunum norður um fjall

Spurningar:

1. Hvussu gongur at asfaltera vegirnar í og uttanfyri nýggju tunlarnar norður um fjall?
2. Hví eru fleiri vegastrekkir í hesari verkætlanini asfalterað av nýggjum?
3. Er undirlagið (vegkassin) nóg væl gjørt?
4. Hvat fyri grót (tilfar) er brúkt sum undirlag til vegirnar í hesari verkætlanini?
5. Kann landsstýrismaðurin tryggja borgarunum, at vegirnir eru nóg væl gjørdir, og at teir fara at halda í eitt nøktandi tíðarskeið, tá ið verkætlanin verður endaliga avhendað?

Viðmerkingar:
Tað hoyrist sera lítið um verkætlanina at gera nýggjar tunlar norður um fjall. Tað í sær sjálvum kann vera eitt gott tekin.

Tað, sum fleiri tó verða varug við, er, at vegastrekkir bæði inni í og uttanfyri tunnilin blíva asfalterað av nýggjum. Ábendingar eru um, at undirlagið (vegkassin) ikki er nóg gott, sum harvið ger, at asfaltið ikki heldur til tungu ferðsluna.

Hetta leiðir tankarnar aftur til eina aðra verkætlan norðan fyri fjall – Viðareiðistunnilin – har vegirnir inni i Dølum fóru illani eftir stutta tíð orsakað av vánaligum undirlagi.

Fyrispurningurin er settur fyri at tryggja, at tað sama ikki hendir í nýggju tunlunum norður um fjall.

Á Løgtingi, 13. september 2024

Steffan Klein Poulsen